# fyri nýggju tilveruna



*Nýtt og gamalt setir dám hugnaligu íbúðina hjá Dianu og Finn í Puntabyrgi*

Tá tað var gjørt seldu hjúnini nakað av innbúgvinum, serliga antikkir møblar og tílíkt. Tað sum ikki skuldi flytast í nýggju íbúðina, varð sett oman í eina stóra gongd í kjallarahæddini, har vinir og kenningar fingu boð um at koma at vita, um tey høvdu brúk fyri nøkrum av hesum.

Samstundis útvegaðu hjúnini sær ein bússu frá Reyðakross felagsskapinum, sum fólk kundu lata til, um tey vildu stuða felagsskapinum.

Tann parturin sum stóð eftir, fór til Reyðakross.

– Eg vil geva eldri fólki mítt besta viðmæli, at gera tað sama, sum vit hava gjørt. Vit trívast serstakliga væl í hesum snotiligu íbúðini og nýtast ikki at hugsa um viðlíkahald og tílíkt, sigur Finn í Puntabyrgi.

– Tað er stórt arbeiði at gera eitt heilt lív upp, sum vit hava gjørt. Tað, at leggja tað gamla til síðis og venja seg við nýggju tilveruna, er krevjandi, men tað var tað vert, tó at tað var við sorgblíðni at vit fluttu úr gamla grannalagnum á Gróthúsvegi, sum altíð so væl ímóti okkum og børnunum.

Vit eru kortini sera takksom, at tað er gingið okkum so væl, og at vit eru fallin so væl til her, sigur Diana.

Hon vónar bert, at tey frameftir fara at hava góða heilsu.

## Liva upp á gleði og takksemi

– Eg eri bara so glað – ja, eg kann siga, at vit liva upp á hesa gleði og kenna stórt takksemi. Lívið hjá okkum hevur altíð verið eitt baks, og nú vit hava vunnið á stríðnum, er alt gott, sigur Diana, meðan Finn rættar konuna við at siga: – Tað var ikki baks, tað var ein uppgáva.

Hjúnini hava ferðast í fremmandum londum, har lítið og einki verður gjørt fyri at verja innbúgvarnir. Í hesum sambandi sigur Finn frá einum manni í Rumenia, sum hevði sagt honum, at um hann skuldi hava skurðviðgerð, so skuldi hann gjalda fyri leigu at amboðunum og skurðviðgerð umframt fyri uppihald á sjúkrahúsi.

– Vit hava vælskipað samfelag og hava frítt at fara á sjúkrahús og o.s.fr.. Eg vildi yngst, at onnur fólk kundu komið hendavegin og fingið lut í okkara vælferðarskipan.

– Finnur ætlar sær kortini ikki at sita hendur í favn. Hann hevur keypt sær ein bát, og hevur nú stundir at fara í fjørin, tá høvi býðst. Hann fer hvønn morgun oman í Vágsbotn, har hann hittir aðrar, sum eisini hava bát. Teir hava altíð okkurt at práta um.

So gongur leiðin heim aftur, har byggivirksemi í grannalagnum er stórt. Fleiri bygningar eru í gerð og Finn dámar væl at eygleiða teir ungu, kviku handverkarnar, sum gera sera gott arbeiði.

## Tá bert annar er eftir

– Lívið er í veruleikaum so einfalt. Tað er at hava góða heilsu og at familjan trívist og hevur góðar umstøður, sigur Finn í Puntabyrgi.

Diana í Puntabyrgi hevur eitt ørindi, sum hon heldur vera sannleiksorð at liva eftir:

*Lít við takksemi afturá,*
*lít við treysti frameftir,*
*lít við áliti uppeftir*
*lít vinarliga rundan um teg.*

Hetta ørindi varð sagt í eini morgunandakt í Útvarpinum í 2001.

Um framtíðarvónirnar siga hjúnini: – Vit tosa mest um dagin í dag, og gleðast um tað sum er, men vit tosa eisini um, at ein dag verður bara annar okkara eftir.

– Næstu ferð vit flyta verður annaðhvørt á ellisheim ella til himmals. Tá pakka vit ikki sjálvi.

– Tí eru vit serliga glað fyri, at vit hava fingið møguleikan at byggja tað nýggja upp saman. Tað høvdu vit ikki megnað, um bert annar okkara var eftir, sigur Diana í Puntabyrgi og Finn gevur henni viðhald.



*Við útsýni úr altanuni sæst yvir á Berjabrekku og verkstaðin Virkni í grannalagnum*